# Málini kunnu gerast trupulleikin

**Sum trífaldir meistarar telist HB sjálvsagt millum favorittarnar, men spurningurin tykist vera, hvørt teir framvegis hava somu styrkina. Ikki minst í álopspartinum**

**HB**

*Jákup Mørk*



*Fagnaðurin var øgiligur, tá HB í fjør vann gull triðja árið á rað - og harvið gjørdist mest vinnandi felagið í føroyskum fótbólti*

**HAVNAR BÓLTFELAG**
**FO-110 Tórshavn,**
**Postrúm 1333**
**Tlf 314046/Fax 318202**
**www.hb.fo**

**FORMAÐUR**
**Birgir Enghamar**

**MEISTARAR (18)**
**1955, 1960, 1963, 1964, 1965, 1971, 1973, 1974, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1990, 1998, 2002, 2003, 2004**

**STEYPAVINNARAR (26)**
**1955, 1957, 1959, 1962, 1963, 1964, 1968, 1970, 1971, 1972, 1973, 1975, 1976, 1978, 1979, 1980, 1981, 1982, 1984, 1987, 1988, 1989, 1992, 1995, 1998, 2004**

**GREIPUVINNARAR (12)**
**1955, 1963, 1964, 1971, 1973, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1998, 2004**

**Í 1. DEILD (62 ÁR)**
**1942-43, 1945-**

**Í EUROPA (10)**
**Meistarakappingin 1999/00, 2003/04, 2004/05, Steypavinnarar 1993/94, 1996/97, 1997/98, UEFA Cup 1998/99, Intertot 1995/96, 2000/01, 2001/02**

Tað er altíð truplari at varðveita eina støðu sum føroyameistari, heldur enn at gerast føroyameistari, verður ofta tikið til. Tað kann eisini væl vera, at nakað er um tosið, men í HB tykjast tey tó ikki leggja stórvegis í hetta.

Triðja árið á rað eydnaðist teimum í fjør at vinna MF-gullið. Og tá felagið so samstundis fylti 100, vann greipuna, Atlantic-kappingina og yvirhálaði KÍ sum tað mest vinnandi í landinum, so hava viðhaldsfólkini bara orsøk at vera væl nøgd.

## Skert álop

Og hóast kappingin av øllum frontum sjálvandi er hørð, so slepst valla undan at nevna trífaldu meistararnar, tá tosast skal um favorittar til komandi kappingarárið.

Men spurningurin er so, um liðið er eins sterkt í ár, sum tað hevur verið tey trý undanfarnu árini. Største spurnarteknið má helst setast við álopspartin. Eftir at Rógvi Jacobsen er farin til Íslands, hevur liðið í øllum førum eitt vápn færri, tá tosað verður um skjóta umstillingsspælið, sum HB hevur meistrað. Hartil er Heðin á Lakjuni so eisini farin til Klaksvíkar, meðan Símun Eliasen í ár fer at spæla við barndómsfelagnum, ÍF. Tað telir helst heldur ikki rætta vegin, at Heini Fernandez í summar fer um tey 39, og at hann hartil helst er skaddur teir fyrstu tveir tríggjar mánaðirnar.

Gaman í hevur liðið í leikarum sum Jákup á Borg, Tór-Ingar Akselsen og nøkrum av teimum heilt ungu leikarar, sum kunnu skjóta mál, men í spælistíli eru teir rættiliga ólíkir Rógva og Heina. Og hetta ger eina umstilling av spælinum neyðuga.

## Fleiri standa klárir

Nakað, sum eyðkenni hópin hjá HB í fjør, var stóra breiddin á liðnum. Og ikki minst, hvussu nógvir ungir mans stóðu til reiðar at koma inn.

Við fráveruni av lyklaleikarum er tí eisini upplagt at rokna við, at onkur av hesum veruliga kann gera um seg í ár. Nøvn sum, Emil Leifsson, Eli Thorsteinsson, Páll Mohr Joensen og Hendrik Rubeksen, fyri bara at nevna nøkur, hava seinnu árini troðka seg alt nærri einum plássi millum teir fyrstu ellivu, og skal HB aftur standa ovast í ár, er alneyðugt, at tikið verður við ábyrgdini.

Og so eru eisini hóast alt nakrir royndir leikarar, sum hesir yngru kunnu lena seg uppat, tá mest stendur á. Jan Dam og Hans á Lag verða ætlandi báðir partar av verjuni, og á miðvøllinum rennur Rúni Nolsøe framvegis sum ein annar unglingi.

Tí eigur liðið framvegis nógvar av dygdunum, sum hava vissað teimum gullið seinnu árini. Men um tað er nóg mikið, er so ein annar spurningur.

| Navn | pláss | landsdystir/mál | áður leikt við |
|---|---|---|---|
| Bárður Johannesen | málverji | | |
| Tróndur Vatnhamar | málverji | | B36 |
| Pól N. Joensen | málverji | | |
| Jóhannis Joensen | verja | 17/0 | MB, FSV, B36 |
| Eli Thorsteinsson | verja | | |
| Janus M. Joensen | verja | | |
| Jan C. Dam | verja | 39/1 | KÍ, B68 |
| Hans á Lag | verja | | |
| Rani Debes Christiansen | verja | | |
| Rasmus Nolsøe | verja/miðvøllur | | TB |
| Hallur Danielsen | verja/miðvøllur | | |
| Vagnur M. Mortensen | verja/miðvøllur | 1/0 | |
| Rúni Nolsøe | miðvøllur | 3/0 | VB |
| Emil Leifsson | miðvøllur | | |
| Kári Nielsen | miðvøllur | 1/0 | B71, Skála |
| Svenn Jacobsen | miðvøllur | | |
| Tór-Ingar Akselsen | miðvøllur/álop | 2/0 | FSV |
| Rókur av Fløtum Jespersen, | miðvøllur/álop | | |
| Jákup á Borg | miðvøllur/álop | 37/2 | B36, OB (DAN) |
| Heini Fernandez | álop | 1/0 | Silkeborg (DAN), Viborg (DAN), FCK (DAN), AB (Dan) |
| Johan Eivind Mouritsen | miðvøllur/álop | | |
| Hendrik Rubeksen | álop | | |
| Páll M. Joensen | miðvøllur/álop | | |
| John Heri Dam | miðvøllur/álop | | B36, B68, ÍF Føroyar (DAN) |
| Pól T. Dam | verja/miðvøllur | | |

**Tilgongd**

| | |
|---|---|
| Tór-Ingar Akselsen | Fluttur heimaftur |
| Tróndur Vatnhamar | B36 |
| Jóhannis Joensen | B36 |
| Rani D. Christiansen | AB |

**Frágongd**

| | |
|---|---|
| Rógvi Jacobsen | KR (ÍSL) |
| Heðin á Lakjuni | KÍ |
| Símun Eliasen | ÍF |

**Venjari: Heine Fernandez**
Hjálparvenjari: Albert Ellefsen
Málmansvenjari: Sámal Hansen
Liðleiðari: Sigurd Hansen
Fysioterapetur: Klæmint Isaksen